FAROE
LAW

# VIÐTØKUR

hjá

**Fróðskapur sp/f**

## Navn felagsins, endamál og heimstaður

§ 1

Navn felagsins er Fróðskapur sp/f við hjánavninum Faroe University Press, og tað hevur heimstað í Tórshavn.

§ 2

Endamál felagsins er at reka vísindaligt útgávuvirksemi og annað virksemi, sum natúrliga hoyrir til slíkt virksemi.

## Innskotspeningur og smápartaprógv

§ 3

Innskotspeningurin er settur til kr. 440.000,-.

Smápartaprógvini verða at skriva inn í smápartaprógvabók felagsins.

Eingi smápartaprógv hava framíhjárættindi.

Smápartaeigararnir hava ikki skyldu at lata smápartaprógv síni innloysa.

Smápartaprógvini kunnu frítt verða seld millum upprunaligu smápartaeigararnar, men annars einans við loyvi frá nevndini.

## Roknskapur o.a.

§ 4

Tá ið grannskoðaður roknskapur er góðkendur av aðalfundinum, verður vinningsbýti útgoldið á skrivstovu felagsins til hann, ið er skrivaður í smápartaprógvabók felagsins sum eigari av smápartapróvnum.
Vinningsbýti, ið ikki er tikið út innan 3 ár frá gjalddegnum, hevur smápartaeigari ikki krav uppá.

§ 5

Tá ið øll líkindi eru til, at eitt smápartaprógv er misfarist, og hann, ið er skrivaður sum eigari av tí, biður um tað og ber kostnaðin, kann nevndin lata tað mortificera uttan dóm sambært teimum reglum, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri "ikke-omsætningspapirer".

## Aðalfundur

§ 6.

Aðalfundur verður hildin í Tórshavn áðrenn apríl mánaður er farin.

Nevndin boðar í minsta lagi 14 dagar og í mesta lagi 4 vikur frammanundan hvørjum einstøkum smápartaeigara til fundar við brævi til tann bústað, hann hevur latið skriva í smápartaprógvabókina.

Brævið skal innihalda fundarskrá við tilskilaðum fundarstaði og -tíð. Verða uppskot at viðgera, ið til samtyktar krevja serligan meiriluta, skal hetta verða tilskilað í fundarboðunum.

Uppskot frá smápartaeigarunum skulu, fyri at koma til viðgerðar á vanligum aðalfundi, verða nevndini í hendi áðrenn 14 dagar fyri aðalfundin.

Eykaaðalfundur verður hildin eftir avgerð hjá nevnd og/ella aðalfundi ella, tá ið smápartaeigarar, ið eiga 1/4 av innskotspeninginum, skrivliga krevja tað. Boðað verður til eykaaðalfundar innan 14 dagar eftir, at skrivligt krav er komið nevndini í hendi.

Í seinasta lagi 8 dagar fyri hvønn aðalfund skulu til skjals á skrivstovu felagsins verða tilskilað dagsskrá og tey fullfíggjaðu uppskot, ið skulu verða borin fram á fundi, og, tá ið ársaðalfundur er, eisini ársroknskapur við grannskoðaraváttan og stjórnar- og nevndarundirskriftum.

§ 7

Á ársaðalfundi skulu fundarevni vera hesi:
a) Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna ári.
b) Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar.
c) Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlop sambært góðkenda roknskapinum skal verða nýtt ella tap sambært góðkenda roknskapinum verður dekkað.
d) Val av nevndarlimum og møguligum eykalimum.
e) Val av grannskoðara.
f) Uppskot frá nevnd ella smápartaeigarum, um nakað er.

§ 8

Aðalfundurin velur eftir uppskoti frá nevndini ein fundarstjóra. Hann kann vera nevndarlimur.

Fundarstjórin stýrir fundinum og ger av allar spurningar viðvíkjandi viðgerð av málum og atkvøðugreiðslu.

Allir smápartaeigarar, ið hava atkvøðurætt, kunnu krevja skrivliga atkvøðugreiðslu.

§ 9

Hvør smápartaeigari eigur eina atkvøðu fyri hvørjar kr. 1.000,-, hann eigur í innskotspeningi.

Til at greiða atkvøðu á aðalfundi krevst, at partarnir eru skrivaðir inn í smápartaprógvabók felagsins.

Atkvøðurættur kann verða framdur við fulltrú. Fundarstjórin avger gildi hennara.

§ 10
Á aðalfundi kunnu bert verða samtykt uppskot, ið standa á fundarskránni og broytingaruppskot til teirra.

Mál til viðgerðar á aðalfundi verða avgjørd við vanligum meiriluta, uttan so at lógir, hesar viðtøkur ella smápartaeigarasáttmáli krevja serligan meiriluta.

Til at samtykkja avgerðir um broyting í viðtøkum og um avtøku av felagnum krevst í minsta lagi, at bæði 2/3 av tí innskotspeningi, sum er umboðaður á aðalfundinum við atkvøðurætti, og 2/3 av greiddum atkvøðum atkvøða fyri.

§ 11
Frásøgn frá tí, ið gjørdist á fundi, verður førd í fundarbók. Bókin, sum nevndin hevur góðkent til hetta, verður at undirskriva av fundarstjóranum.

## Nevnd og stjórn

§ 12
Felagið verður stýrt av einari á aðalfundi valdari nevnd, ið hevur 3 limir. Føroya Fróðskaparfelag velur 2 limir og Fróðskaparsetur Føroya velur 1 lim.

Nevndarlimir verða valdir fyri eitt ár í senn.

Verður talið á nevndarlimum í árinum minni enn tríggir, við tað at ein ella fleiri fara burturúr, skal nevndin sum skjótast boða til eykaaðalfundar til val av nevndarlimum. Teir nevndarlimir, ið soleiðis hava tikið við, starva til næsti ársaðalfundur er hildin.

§ 13
Nevndin skipar seg við einum formanni og einum næstformanni.

Nevndin ásetir við starvsskipan greinligari reglur fyri virksemi sítt.

Tað, sum á nevndarfundi verður avgjørt, verður ført í gerðabók, ið skal verða undirskrivað av hjástøddum nevndarlimum. Á fyrsta nevndarfundi, ið hildin verður, eftir at roknskapurin er grannskoðaður, verður grannskoðarafrágreiðing framløgd, og teir nevndarlimir, ið eru á fundi, skulu við undirskrift síni vátta, at teir hava gjørt seg kunnugar við tað, sum í henni er.

Nevndin skal seta ein stjóra til at hava ta dagligu leiðsluna av felagnum.

Nevndin kann veita umboðsfulltrú.

§ 14

Felagið verður teknað av stjóranum ella av formanninum saman við einum nevndarlimi.

## Roknskapargrannskoðan

§ 15

Á aðalfundi verður ein roknskapargrannskoðari valdur fyri eitt ár í senn.
Hann skal hava umsjón við roknskapinum og grannskoða ársroknskapin. Grannskoðarin hevur rætt til at síggja roknskaparbøkur felagsins, tá ið hann vil.

§ 16

Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið. Fyrsta roknskaparár gongur frá stovnanini til 31. desember 2006.
Roknskapurin verður undirskrivaður av nevndini og verður áskrivaður av grannskoðaranum.

§ 17

Ársroknskapurin skal verða vandaliga uppgjørdur, so hann sýnir øll virði og allar skuldbindingar, ið til eru, og soleiðis at neyðugar avskrivingar verða gjørdar.
Ansað skal verða eftir, at roknskapurin og fíggjarstøða felagsins sýna sonnu støðu felagsins, eftir tí sum nevndin best kann ætla.

Stendur óavskrivað fíggjarhall frá árinum fyri, skal ársavlopið fyrst verða nýtt til at avskriva hetta. Restin verður nýtt so sum nevndin skjýtur upp og aðalfundurin samtykkir.

## Um avtøku felagsins

§ 18

Verður samtykt, at felagið skal verða tikið av, fara nevnd og stjórn frá, og aðalfundurin velur ein ella fleiri avtøkustjórar, ið taka við leiðslu felagsins.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi 15 / 9 2005.

Andras Mortensen

R. Joh

Pedersen